VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 11 og 14 stig.



Veðrið leygardagin:
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og ælingur, sum frálíður vátaslettingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.



Veðrið sunnudagin:
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og kavaælingur, men eisini sólglottar. Hitin um dagin millum 0 og 3 stig, um náttina frostveður.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og kavaælingur, men eisini sólglottar. Hitalagið millum frostmarkið og ÷4 stig.

Eivør á íslendskum festivali

Størsti rockfestivalurin í Ísland kallast Airwaves, og hann verður hildin í hesum døgum. Eivør Pálsdóttir er eitt av nøvnunum, sum skal spæla á festivalinum hesaferð

TÓNLEIKUR
Eyðun Klakstein

Mikudagin byrjaði Airwaves-festivalurin í Íslandi, og hann heldur fram til sunnudagin. Talan er um størsta tiltakið av sínum slagi í Íslandi, og tað kemur ein ørgrynna av fjølmiðlafólki, plátufelagsfólki, sjónvarpsstøðum og útvarpsstøðum úr øllum heiminum til festivalin.

156 nøvn eru í skránni í ár, og av teimum eru 19 útlendsk nøvn. Eitt av teimum er føroyska Eivør Pálsdóttir.

Gjøgnumbrot

Airwaves hevur verið lykil til fleiri íslendsk gjøgnumbrot uttanlands, tí so stórur áhugi er fyri festivalinum kring heimin. Bólkar sum Gus Gus, Bang Gang, Mínus, Leaves og Quarashi hava gjørt sær dælt av hesum møguleika, og eitt nú Gus Gus og Quarashi hava selt okkurt um eina millión fløgur hvør.

Aiwaves var eisini ein av orsøkunum til, at Sigur Rós seldu tvær milliónir fløgur kring heimin.

Hesin íslendski festivalurin kann tí gerast ein gyltur møguleiki hjá Eivør Pálsdóttir. Hon fer at spæla saman við íslendska bólki, sum er mannaður við Pétur Grétarsson, Birgir Bragason og Eðvarð Láurusson. Teir hava spælt saman við Eivør í eina tíð og hava eisini havt framførslur í Føroyum.

Eivør Pálsdóttir verður í næstum fløguaktuell við útgávuni Krákan.

Eivør Pálsdóttir skal spæla á íslendska festivalinum Airwaves, sum hevur verið lykilin til fleiri íslendsk gjøgnumbrot í útlandinum

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	10
Nuuk	6
Qaqortoq	11
Ammassalik	7
Saint John's	10
Halifax	15
Reykjavík	11
Seyðisfjørður	10
Tórshavn	10
Lerwick	11
Aberdeen	12
London	14
Tromsø	6
Bergen	9
Oslo	–
Stokkhólm	7
Keypmannah.	8
Helsinki	3
Moskva	3
Berlin	9
Warzawa	6
Kiev	7
Bukarest	7
Paris	12
Madrid	18
Róm	22
Malorca	22
Athen	21
Malta	24
Tunis	26
Beijing	21
New Dehli	31
Bangkok	32
Jakarta	30
Sydney	19
New York	17
Miami	27
Los Angeles	20
Meksikobýur	21
Panama	–
La Paz	15
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	30

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt hátrýst, 1040 hPa. yvir Skagerrak fer spakuliga vestureftir og viknar. Eitt lágtrýst, 987 hPa. yvir Atlantshavinum á 53N-35V fer spakuliga í landsynning.

Hátrýstið yvir Norðsjónum viknar framvegis, men eitt annað hátrýst yvir 1040 hPa. yvir Eystur-Grønlandi stendur í stað og mennist. Tað sendir kalda luft av norði móti Føroyum.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 15/10 kl. 06⁰⁰– 16/10 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,5°
Minsti hiti máldur í okt.: ÷4,0° Mesti hiti máldur í okt.: 18,4°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,3 mm – mált frá 15/10 kl. 06⁰⁰–16/10 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í oktober: 37,9 mm

I EINUM SAMFELAG
HAR TEY VEIKASTU
HAVA TAÐ GOTT,
HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

JUNIOR
BUSS TAXA
KOYRING
pláss til 10 ferðandi
Tlf. 22 33 11
Eyðbjartur Danielsen
Pætursgøta 14 • FO-188 Hoyvík • Tórshavn

VESTFALLSKYRRINDI

10. oktober: Fullmáni
14. oktober: Mánin longst frá jørðini
18. oktober: Seinna kvarter

Kelda: Almanakkin 2003

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
17. okt	—	12.22	11.22	23.58	11.37	—	01.58	14.22	02.58	15.22	10.37	23.13	09.37	22.13	00.13	12.37	01.13	13.37	—	12.07	01.58	14.34
18. okt.	00.58	13.34	—	12.34	00.13	12.49	02.58	15.34	03.58	16.34	11.49	—	10.49	23.26	01.13	13.49	02.13	14.49	00.43	13.19	01.58	14.34
19. okt	02.11	14.48	01.11	13.48	01.26	14.03	04.11	16.48	05.11	17.48	00.26	13.03	—	12.03	02.26	15.03	03.26	16.03	01.56	14.33	03.11	15.48
20. okt	03.10	15.32	02.10	14.32	02.25	14.47	05.10	17.32	06.10	18.32	01.25	13.47	00.25	12.47	03.25	15.47	04.25	16.47	02.55	15.17	04.10	16.32

5 707265 100050 >